# gu Una



*Uni og kona hansara Emma og níggju ára gamla Anna geva kríatúrunum. Her Uni við trúgva fylgisveininum Lottu, sum er 13 ára gomul nú*

skulu ikki bestemma, hvat ein blindur kann og ikki kann.

## Stjóri í egnari fyritøku

Uni er sjálvstøðugt vinnurekandi við egnari massasjufyritøku, har hann arbeiðir allan dagin – bæði úti á virkjum og í klinikkini heima við hús. Í fasta kundahópinum finna vit trý fiskavirki umframt Taks, Ellisheimið í Runavík, Mjørkadal og fótbóltsfelagið Víkingur. Eina ferð um vikuna fara hann og trúgvi fylgisveinurin, labradorurin Lotta, einsamallir við bussinum til Havnar, har hann masserar á vakurleikastovuni Cosmeto og á Blindastovninum. Tá fara teir av uppi við SMS og ganga sjálvir runt í Havnini.

Uni lærdi til massør, eftir at hann hevði mist sjónina, og hann greiðir frá, at hetta er eitt sera vanligt yrki hjá blindum.

- Onkrastaðni í Asia er tað soleiðis, at allir massørar eru blindir, greiðir hann frá.

## Rør og rennur

Umframt útbúgvingina sum massørur, hevur hann eisini tikið eina serliga telduútbúgving, og undirvísir viðhvørt í teldu á Blindastovninum. Hann brúkar eitt serligt taliforrit, sum eitur Jaws og er ætlað blindum. Hetta ger, at Uni eitt nú fær kannað teldupost og fylgt við í tíðindameldrinum, serliga innan ítrótt, sum hevur eitt stórt pláss í hjartanum hjá Una. Í hesum sambandi fortelur hann um ta ferðina, hann róði við áttamannafarinum Heiðabátinum. Hetta var so seint sum í 2000, og endaðu teir við at vinna bronsu á ólavsøku.

- Ein annar á liðinum hevði tá skipað soleiðis fyri, at eg fekk eitt serligt steyp fyri avrikið, fortelur hann glaður.

Hann og Emma ganga og renna nógvar túrar saman, og viðhvørt leigar familjan seg inn í eina svimjihøll.

- Tað er ikki lætt at vera kropsliga virkin, tá man er blindur. Har er so nógv, man skal ansa eftir, og tí hava vit lært okkum at renna saman við einum elastikki millum okkum, sigur Emma, sum eisini er fegin um, at hava ein virknan mann á heimafrontinum. Tí sambært Una sjálvum er hann fyrst og fremst familjumaður.

- Um eg ætli mær at tøma uppvaskimaskinuna, hevur hann ofta longu verið har. Eisini verða klæðini tikin av snórinum, løgd saman og uppá pláss. Og tað kemur meiri enn so fyri, at gólvini eru vaskað, tá ið eg komi heim, forklárar Emma, sum akkurát er byrjað á sjúkrasystraskúlanum í Havn.

- Eg fari heimanífrá longu klokkan 7 á morgni, áðrenn hini eru uppi. Tí fer Uni upp við børnunum og fær tey í skúla hvønn dag, sigur Emma. Hon greiðir eisini frá, at Uni ikki er bangin fyri at fáa nakrar snuddir av og á. Tí sjálvandi smekkar hann seg í viðhvørt. Um okkurt stingur út í andlitshædd hevur hann ongan kjans, tí tað sær hundurin heldur ikki. Men eisini hetta tekur Uni við opnari pannu.

## Hevur ikki hæddarskrekk

Men tað, sum fekk okkum norður í dag, var hendan søgan um mannin, sum klívur uppi í stiganum, hóast hann er blindur. Men hetta er ikki fyrstu ferð Uni fæst við handverk, tí hann hevur altíð verið sera fittur í hondunum. Hetta kom eitt nú til sjóndar heima hjá foreldrunum, har hann gjørdi eina altan og legði nýtt gólv á. Eisini hevur hann smíðað skógvahillina í gongini og sett nýggja úthurð í kjallaran her heima.



*- Eg havi góða føling við tí, sum eg geri. Eg skal bara halda meg til trinini á stiganum og fara hóvliga fram, sigur Uni. Pápi hansara kannaði arbeiðið hjá soninum, og har var alt perfekt í vater og lodd. Tummastokkurin hevur punktskrift. Eisini vaterpassið, sum gevur ljóð, er hent at hava, tá klædningurin skal skiftast*

Men hví velur ein blindur maður at skifta klædningin á húsinum sjálvur, í staðin fyri at senda boð eftir handverkarum?

- Tað komst einamest av, at eg havi feriu og eri heima – og so er tað sjálvandi eisini nógv bíligari at gera tað sjálvur. Eg havi góð amboð, so sum tummastokkin her, sum hevur punktskrift, og eitt vaterpass, sum gevur ljóð frá sær, sigur hann og vísir okkum tummastokkin.

- Eg havi góða føling við tí, sum eg geri. Eg skal bara halda meg til trinini á stiganum og leggja hann niður, tá eg eri liðugur, sigur hann. Og Uni hevur sjálvandi ikki hæddarskrekk.

- Og eg kann halda fram at arbeiða, eisini tá ið myrkrið fellir á, sigur hann og flennir.

Nógv fólk steðga á, tá tey síggja hann uppi í stiganum. Hann minnist ein dagin, hann stóð har uppi undir tekjuni. Tá hoyrir hann tveir mans standa undir einum húsaveggi og práta. Tá letur í øðrum:

- Noy eg voyt ikki. Nú stendur hatta og mátar við tummastokki og sær ikki eitt petti.



*Uni arbeiðir fulla tíð sum massørur. Flestu kundarnir eru starvsfólk á virkjum og stovnum, sum fáa regluliga vitjan av Una*